# VINSTRASVING Á POLITISKUM VEGAMÓTI

**JAVNAÐARFLOKKURIN** SKAL HALDA **RIMMARFAST** UM **SOSIALDEMOKRATISKU** RØTURNAR. FLOKKURIN SKAL TIL **VINSTRU** OG HAVA **TÆTT** SAMBAND VIÐ **FAKFELAGSRØRSLUNA**, TÍ **STÆTTARSTRÍÐIÐ** ER **IKKI** AV. MEN **FLOKKURIN** SKAL **EISINI** LEGGJA SEG **MEIRA** EFTIR VINNU- OG **BÚSKAPARMÁLUNUM**, SUM HIGARTIL HAVA VERIÐ **HÁBORGIN** HJÁ TEIMUM **BORGARLIGU**, SIGUR **NÝGGI** FORMAÐURIN **AKSEL JOHANNESEN** Í SAMRØÐU VIÐ **SOSIALIN**



**SAMRØÐA**
Dánjal Højgaard
post@sosialurin.fo

Eitt nýtt ættarlið. Og byrjanin til eitt nýtt tíðarskeið.

Soleiðis ljóðaðu nakrar av yvirskriftunum, tá ið Javnaðarflokkurin 5. mars fekk nýggjan formann.

Aksel Johannesen hevur avloyst Jóannes Eidesgaard, sum hevur stýrt Javnaðarflokkinum tey seinastu 15 árini. Tey seinastu sjey árini í samgongu, meginpartin av tíðini saman við tveimum borgarligum flokkum, Sambandsflokkinum og Fólkaflokkinum.

Sosialurin hevur tosað við nýggja formannin í Javnaðarflokkinum um hvønn vegin, hann heldur, at flokkur hansara skal fara í eini rembingartíð fyri javnaðarrørsluna í Europa. Og eini tíð, har flokkurin fær metlága undirtøku í veljarakanningunum.

### Tørvur á broytingum

**Tá ið Jóannes Eidesgaard handaði tær formansstafettina á landsfundinum 5. mars tað við Kennedy-sitatinum: »A man may die, nations may rise and fall, but an idea lives on«. Hvat er javnaðarhugsjónin í dag?**

– Hugsjónin snýr seg framvegis um frælsi, javnað og samhaldsfesti. Tað er grundvøllurin. Men fleiri flokkar eru farnir at líkjast Javnaðarflokkinum meira og meira. Tí hevur Javnaðarflokkurin ein ávísan trupulleika, um hann skal markera seg sum nakað serstakt.

**Hvussu loysa tit trupulleikan?**

– Broytingarnar skulu koma úr neðra, frá grasrótunum í flokkinum. Tað er umráðandi at fáa semju um tey politisku málini, tí so verður tað eisini truplari hjá tingmonnum at arbeiða í sjálvdrátti. Javnaðarflokkurin skal ikki byggja seg fyri politiskum rákum. Rákið í vesturheiminum og kanska serliga í Norðurlondum hevur í longri tíð verið rættuliga borgarligt. Men Javnaðarflokkurin skal ikki laga sín politikk eftir hesum. Vit skulu halda fast við tey upprunaligu virðini, men sjálvandi skulu vit dagføra okkara politikk. Tað vit vilja og siga, skal vera meira greitt. Tað skal vera meira kantur í.

### Velur Stoltenberg-leiðina

Krøv um grundleggjandi nýskipanir á vælferðarøkinum hava tey seinastu 20 árini flutt javnaðarflokkarnar í Europa móti miðjuni. Við bretska New Labor sum fyrimynd hava teir lænt burturav nýliberalistiska arvagóðsinum, samstundis sum teir borgarligu flokkarnir nógva staðni hava fingið sær ein meira sosialan profil. Úrtslitið er, at floksmørkini eru blivin kám.

Tó eru undantøk. Í Norra hevur Arbeiðaraflokkurin leitað aftur til tær sosialdemokratisku røturnar og hevur síðani 2005 stjórnað landinum í tøttum samstarvi við landsfelagið hjá fakfeløgum LO og vinstraveingin.

**Skal Javnaðarflokkurin ganga New Labor-leiðina, sum t.d. Nyrup og seinni Thorning Smith hava gjørt í Danmark. Ella skal hann velja leiðina hjá Stoltenberg og norska Arbeiðaraflokkinum?**

– Har haldi eg so avgjørt, at vit skulu velja seinnu loysnina. Vit skulu hava tætt samband við grasrøturnar í flokkinum og fakfeløgini. Tað er tann vegin vit skulu fara. Javnaðarflokkurin eigur ikki at broyta sítt innihald, bara tí at rákið hevur verið borgarligt í nýggjari tíð. Men tað merkir kortini ikki, at Javnaðarflokkurin ikki kann markera seg í fíggjar- og vinnupolitiskum málum. Fyri tað um vit hava eitt greitt boð uppá vinnu- og fíggjarpolitikkin, so merkir tað ikki, at vit sleppa málunum um t.d. at útgjaldsskipanirnar skulu vera samhaldsfastar og at skúlarnir, heilsuverkið og aðrar vælferðartænastur skulu vera fyri øll. Javnaðarflokkurin má so undir ongum umstøðum ganga burtur frá sínum grundsjónarmiðum fyri kanska at tekkjast veljarunum.

> »Tað eru fleiri samfelagsbólkar, sum sum ikki bera byrðar í sama mun sum løntakararnir og har skulu vit býta byrðarnar betri

**Í 2005 boðaði Jóannes Eidesgaard á landsfundi hjá Javnðaraflokkinum frá, at stættarstríðið er av. Heldur tú, at stættarstríðið er av?**

– Nei, tað eri eg ikki samdur í. Nú skal eg ikki siga, hvussu hann meinti síni orð, men eg eri ikki samdur í, at stættarstríðið er av. Munurin er framvegis stórur millum tey við teimum hægstu og tey við teimum lægstu lønunum. Tað eru fleiri samfelagsbólkar, sum á mangan hátt eru illa fyri í dag. Tey lægst løntu, tey ófaklærdu, sita hart í tí, tí bústaðar- og livikostnaðurin er so høgur. Men eisini útbúgvin fólk, sum t.d. pedagokar, heilsuhjálparar og fleiri onnur hava trupult við at fáa endarnar at røkka saman. Fyri ikki at tala um teir støku uppihaldararnir, sum hava tað serliga trupult.

**Hoyri eg teg siga, at javnaðarflokkurin skal flyta seg til vinstru?**

– Ja, tað er møguliga rættast at siga, at flokkurin skal til vinstru. Tað merkir, at vit skulu hava eitt tættari samstarv við fakfeløgini og veruliga taka okkum av trupulleikunum hjá teimum, sum hava hava tær lægru inntøkurnar í samfelagnum. Kostnaðarstøðið er ov høgt, og búsetingarmøguleikarnir ov einstáttaðir, og tað ger, at tey við lágum inntøkum hava tað øgiliga trupult.

**Fleiri politiskir eygleiðararnir halda, at Javnaðarflokkinum tørvar eitt ítøkiligt politiskt projekt. Ger hann tað?**

– Nú dámar mær einki orðið projekt, men tað er rætt at flokkinum tørvar ætlanir, sum eru meira ítøkiligar, enn tær hava verið. Eina ætlan, har alt hongur saman, og hesum arbeiðir flokkurin við í løtuni.

**Hvat skal ætlanin snúgva seg um?**

– Tað er alneyðugt, at vit fáa samhaldsfesti millum ættarliðini. Vit, sum eru í arbeiðsførum aldri, hava skyldu at taka okkum av teimum, sum bygdu vælferðarsamfelagið. Men samstundis mugu vit ansa eftir, at byrðan ikki verður so tung hjá summum, at tey ikki knógva undir henni. Tað eru fleiri samfelagsbólkar, sum sum ikki bera byrðar í sama mun sum løntakararnir, og har

▶